Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	08. desember 2020
Mál nr.:	20/00374
Málsviðgjørt:	AP
Eftirkannað:	27. november 2020

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum
(Lækka virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni, rokna skrásetingargjaldið á innfluttum brúktum motorakførum við støði í keypsprísinum, frítaka flytigóðsmotorakfør frá skrásetingargjaldi, stytta tíðarskeiðið fyri undantøku av virðisavgjaldi hjá hýru- ella skúlavognum og leingja undantøkuna fyri at rinda virðisavgjald fyri motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 26. februar 2010, løgtingslóg nr. 160 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 57 frá 18. mai 2015, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2015, løgtingslóg nr. 155 frá 12. desember 2018, løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019, løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2020, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 100 frá 25. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3, stk. 1 verður "persónvognar" broytt til: "persónbilar".

2. Í § 3 verða sum stk. 2 og 3 sett:
"*Stk. 2*. Persónbilar við hybrid tøkni ella plugin-hybrid tøkni, og sum verða skrásettir frá 1. januar 2021, skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.
Stk. 3. Persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásettir frá 1. januar 2023 skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr."

3. § 5 verður orðað soleiðis:
"**§ 5.** Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm^3 er virðisavgjaldið 35% av avgjaldsskylduga virðinum.
Stk. 2. Ásetingarnar í stk. 1 eru eisini galdandi fyri innfluttar brúktar motorsúkklur, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands, við motorstødd yvir 50 cm^3."

4. § 6 verður orðað soleiðis:
"**§ 6.** Fyri motorakfar, sum hevur verið endaliga skrásett uttanlands, verður virðisavgjald rindað av avgjaldsskylduga virðinum, sbrt. § 3, stk. 1, sbr. § 2, stk. 2."

5. Í § 7, stk. 1, nr. 1, 3. pkt. verður "30 mánaðir" broytt til: "20 mánaðir" og "30 mánaðum" broytt til: "20 mánaðum".

6. Í § 7, stk. 1, nr. 8 verður "31. desember 2020" broytt til: "31. desember 2022".

7. Í § 7, stk. 1 verður sum nr. 9 sett:
"9) Innflutt brúkt motorakfar, sum er allýst sum flytigóðs í løgtingslóg um toll."

8. Í § 9 verður sum nr. 5 sett:
"5) Innflutt brúkt motorakfar, ið er allýst sum flytigóðs, sbrt. § 7, nr. 9."

9. § 22, stk. 2-5 verða strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Tørvur er á at gera tillagingar í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum. Tillagingarnar hava til endamáls at framhaldandi eggja borgarum at keypa umhvørvisvinarligar bilar, at lætta um umsitingina mótvegis borgarum og at lætta um umsitingina hjá Akstovuni.

Broytingarnar, sum skotnar verða upp, eru:

- At fara frá upprunavirði til útveganarprísin í sambandi við útroknan av skrásetingargjaldinum fyri innfluttar brúktar bilar.
- At frítaka akfør, sum eru flytigóðs, fyri skrásetingargjald.
- At broyta mánaðartalið fyri, nær ein hýruvognur kann seljast.
- At leingja um freistina fyri, at akfør, sum bara nýta ravmagn og vetni sum framdrift, kunnu keypast avgjaldsfrítt.
- At áseta framtíðar virðisavgjaldið fyri akfør, sum bara nýta ravmagn og vetni sum framdrift.
- At lækka virðisavgjaldið á akførum við hybrid tøkni og akførum við plugin-hybrid tøkni.

Í fleiri ár hevur tað verið ein stórur trupulleiki hjá Akstovuni at finna fram til upprunavirðið á innfluttum brúktum persón- og vørubilum og motorsúkklum. Upprunavirðið skal brúkast í sambandi við innkrevjing av skrásetingargjøldum. Umsitingarliga er hetta tyngjandi fyri Akstovuna og fer við nógvari tíð. Skrásetingargjaldið er eitt virðisavgjald, sbrt. § 2, stk. 1 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum. Afturat virðisavgjaldinum, rinda bilar eisini eitt CO_2-avgjald, sum tekur støði í útlátinum frá bilinum.

Skotið verður upp, at Akstovan kann fara frá at brúka upprunavirðið og yvir til at brúka útveganarprísin, keypsfakturan, í sambandi við innkrevjing av skrásetingargjøldum. Tvs. at Akstovan brúkar keypsprísin til at áseta avgjaldsskylduga virðið og avgjaldsrokna keypsprísin til og við kr. 100.000,- við 50 % og keypsprísin oman fyri kr. 100.000,- við 75 %.

Tøl frá Akstovuni vísa, at tað eru sera fá brúkt akfør, sum verða innflutt av brúktbilainnflytarunum, sum eru eldri enn 5 ár. Royndirnar vísa, at veruligi keypsprísurin fyri akførini, svarar á leið til metta upprunavirðið, niðurskrivað sbrt. galdandi § 6 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum.

Omanfyri nevndi útrokningarhátturin er tann sami, sum TAKS brúkar til at tollavgreiða akfør eftir og til at áseta, hvussu nógv meirvirðisgjald akfarið skal rinda, svarandi til 25 % av keypsprísinum.

Um Akstovan kundi brúkt keypsprísin, eins og TAKS ger, hevði hetta havt fleiri fyrimunir við sær, bæði fyri umsitingina á Akstovuni og fyri viðskiftafólkini. Innkrevjingin av skrásetingargjøldunum hevði verið munandi lættari at umsitið, og skrásetingargjøld og

skráseting av innfluttum brúktum akførum kundi verið avgreitt eftir einum degi. Hetta hevði gjørt, at viðskiftafólkini høvdu verið meiri nøgd, vandin fyri mistøkum, sum t.d., at upprunavirðið er skeivt ásett, tí man ikki kennir neyva virðið á bilinum, hevði minkað munandi, tí Akstovan kann brúka ein faktura, sum frammanundan er góðkendur av TAKS, sum avgjaldsgrundarlag. Harafturat veit innflytarin frammanundan, hvussu nógv hann skal rindað í meirvirðisgjaldi og skrásetingargjøldum, tá hann kennir keypsprísin, avgjaldsgrundarlagið.

Hagtøl frá Akstovuni vísa, at higartil í 2020 eru 42 brúktir persónbilar, 19 brúktir vørubilar og 4 brúktar motorsúkklur innflutt til landið.

Í 2018 og 2019 vóru ialt 140 brúktir persónbilar, 19 brúktir vørubilar og 4 motorsúkklur innfluttar til landið.

Flytigóðsbilar eru eisini umfataðir av § 6 í lógini. Hetta eru vanliga eldri bilar, sum fólk hava átt í nøkur ár, og sum tey taka við sær úr t.d. Danmark, tá ið tey flyta til Føroyar.
Eftir galdandi reglum eru hesir bilar frítiknir fyri at rinda meirvirðisgjald, um teir ikki verða seldir víðari innan eitt ár. Tó skulu teir rinda virðisavgjald av upprunavirðinum. Hetta ørkymlar fólk. Virðisavgjaldið er sera kostnaðarmikið, tí talan er oftast um eldri bilar, og teir kunnu ikki niðurskrivast meira enn 50% sbrt. lógini.
Akstovan mælir tí til at strika kravið um, at flytigóðsbilar skulu rinda skrásetingargjald. Landsstýrismaðurin hevur í § 7, stk. 2 heimild til í kunngerð at áseta, at tað bert er møguligt at innflyta ein bil pr. persón 18 ár og eldri, fyri at sleppast kann undan spekulatión.
Akstovan vísir á, at talan er um umleið 10-15 flytigóðsbilar, sum verða innfluttir til Føroya um árið. Landið er ikki fyri inntøkumissi orsakað av broytingini, men harafturímóti hevur broytingin nógv at siga fyri tey fólkini, sum hava tikið stigið til at flyta aftur til Føroyar.

Ein bilstøð hevur víst á, at hýruvognar koyra lutfalsliga fleiri kilometrar í sambandi við eitt nú koyring til og frá flogvøllinum. Hetta ger, at søluvirðið á einum hýruvogni eftir 30 mánaðir minkar lutfalsliga meiri í mun til, tá ið lógin bleiv sett í gildi. Tí verður mælt til at lækka mánaðartalið niður í 20 mánaðir uttan at rinda avgjald.

Í 2008 blivu akfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift fyri fyrstu ferð undantikin virðisavgjaldi, og síðan tá er hetta fíggjarpolitiska átakið longt fleiri ferðir fyri at stuðla undir umleggingina frá dálkandi orkukeldum til meira varandi orku, samstundis sum eitt slíkt átak eggjar bilkeyparum at keypa umhvørvisvinarligari akfør.

Tann samlaða føroyska bilparkin telur í dag 40.120 akfør, harav 26.534 eru persónbilar. Av hesum eru 269 persónbilar, sum bara nýta ravmagn til framdrift.

Tí verður tað mett at verða neyðugt at fara undir enn eitt 2 ára tíðarskeið, har hesi akfør verða fult undantikin virðisavgjaldi. Somuleiðis verður farið undir at lækka virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni. Hetta verður gjørt fyri at skunda enn meira undir grønu gongdina við vón um at fáa enn fleiri at velja grønu loysnina fram um ta svørtu.

Tíðarskeiðið, har persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni skulu rinda eitt lægri virðisavgjald, verður ikki avmarkað til eitt ávíst áramál. Skotið verður upp, at hesir persónbilarnir frá 1. januar 2021 skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga

virðinum til og við 100.000 kr., og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.
Tá tvey ára tíðarskeiðið fyri frítøkuna av virðisavgjaldinum hjá akførum, sum bara nýta ravmagn ella vetni sum framdrift, er farið, skulu hesi akfør rinda virðisavgjald á sama hátt sum akfør við hybrid tøkni og akfør við plugin-hybrid tøkni.

Sambært hagtølum frá Akstovuni bleiv tað fyrsta akfarið, sum bara nýtti ravmagn til framdrift, selt á føroyska marknaðinum í 2009. Í 2017 vórðu 15 akfør seld, sum bara nýttu ravmagn til framdrift, í 2018 var talið 68, meðan tað í 2019 var 83. Higartil í 2020 eru 97 akfør seld, sum bara nýta ravmagn til framdrift.
Akstovan hevur ongi hagtøl yvir persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni.

1.2. Galdandi lóggáva

Eftir galdandi lóggávu verður upprunavirðið brúkt í sambandi við innkrevjing av virðisavgjaldi. Hetta ger arbeiðið hjá Akstovuni tyngjandi, tí tað er sera torført at finna fram til upprunavirðið á akførunum, samstundis sum tað eisini er ringt hjá viðskiftafólkinum at útvega Akstovuni upplýsingar um upprunavirðið.

Flytigóðsbilar skulu eftir galdandi lóggávu rinda virðisavgjald av upprunavirðinum. Tað er ikki møguligt at niðurskriva flytigóðsbilar meira enn 50%, sbrt. lógini.

Fyri at hýru- og skúlavognar skulu sleppa undan at rinda virðisavgjald, skal akfarið ikki verða skrásett til privata nýtslu innan 30 mánaðir frá tí degi akfarið er skrásett. Um akfarið verður skrásett, áðrenn 30 mánaðir eru gingnir, skal virðisavgjaldið rindast lutfalsliga samsvarandi tíðini, sum restar í teimum 30 mánaðunum.

Motorakfør, sum bara brúka ravmagn ella vetni til framdrift, eru, sambært lógini, undantikin at rinda virðisavgjald fram til 31. desember 2020.
Persónbilar við hybrid tøkni ella plugin-hybrid tøkni rinda eftir galdandi lóggávu fult virðisavgjald.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppgávan hjá Akstovuni at finna fram til upprunavirðið á brúktum innfluttum persón- og vørubilum og motorsúkklum hevur verið nærum vónleys, og hetta hevur havt við sær, at tað hevur tikið fleiri dagar at avgreiða mál um skráseting av akførum.

Endamálið við uppskotinum er at gera innkrevjingina av skrásetingargjøldunum lættari at umsita, samstundis sum skrásetingargjøld og skráseting av innfluttum brúktum akførum kann verða avgreidd eftir einum degi. Somuleiðis verður farið yvir til at brúka sama útrokningargrundarlag, sum TAKS brúkar til at tollavgreiða akfør eftir og til at áseta, hvussu nógv meirvirðisgjald akfarið skal rinda.

Endamálið er, at hýruvognarnir ikki skulu missa virðið ov skjótt, tí at koyrdir kilometrar í samband við víðari sølu hava týdning fyri søluprísin.

Somuleiðis er endamálið við uppskotinum at eggja fólki til at keypa umhvørvisvinarligari akfør. Tí verður farið undir at leingja undantøkuna fyri at rinda virðisavgjald hjá akførum, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, umframt at virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og plugin-hybrid tøkni verður lækkað.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Akstovan fer at nýta eitt annað útrokningargrundarlag, tá finnast skal fram til upprunavirðið á innfluttum brúktum persón- og vørubilum og motorsúkklum. Frameftir verður tað útveganarprísurin, keypsfakturin, sum verður brúktur í samband við innkrevjing av skrásetingargjøldum.

Flytigóðsbilar, sum vanliga eru eldri bilar, skulu ikki longur rinda virðisavgjald og CO_2-avgjald, tá teir verða innfluttir til Føroyar.

Akfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, verða undantikin virðisavgjaldi í 2 ár afturat við virknaði frá 1. januar 2021 til 31. desember 2022.

Virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og plugin-hybrid tøkni verður lækkað frá 1. januar 2021. Tá skulu teir rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr. Higartil hava hesir persónbilarnir rindað fult virðisavgjald.

Frá 1. januar 2023 skulu akfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni sum framdrift, rinda virðisavgjald á sama hátt sum persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar, og er hetta grundað á stutta skotbráið, Fíggjarmálaráðið hevur havt til at skriva uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Í 2017 gjørdi Akstovan eina samanbering av 28 tilvildarligum innfluttum brúktum bilum. Samanberingin vísti, at samlaða virðisavgjaldið verður næstan óbroytt eftir hesum lógaruppskotinum. Hetta sæst eisini aftur í fylgiskjali 2.

Flytigóðsbilar, sum t.d. verða innfluttir úr Danmark, skulu frameftir ikki rinda skrásetingargjald, sum er virðisavgjald og CO^2 avgjald. Hetta fer at hava við sær, at hesar inntøkurnar fara at lækka eitt sindur. Sambært Akstovuni er talan um eini 10-15 bilar, sum árliga verða fluttir til Føroya sum flytigóðs.

1. januar 2023 steðgar fulla frítøkan av virðisavgjaldi fyri akfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift. Tá skulu hesi akfør rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr. eins og persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni.

Persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni fara framyvir at rinda minni í virðisavgjaldi. Hesir bilar fara at rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr. frá 1. januar 2021.

Tað er torført at siga, hvussu nógv akfør, sum bara brúka ravmagn ella vetni til framdrift, væntandi fara at verða seld. Tað sama er galdandi fyri persónbilar við hybrid tøkni ella plugin-hybrid tøkni.

Ein avleiðing av, at virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og plugin-hybrid tøkni verður lækkað er, at virðisavgjaldið, sum hesir bilar fara at gjalda sbrt. uppskotinum verður á leið tað sama sum ein líknandi persónbilur við bensinmotori annars rindar í virðisavgjaldi í dag. Hetta fer allarhelst at stuðla undir, at fleiri persónbilar við hybrid tøkni ella plugin-hybrid tøkni fara at verða seldir og stuðla undir umleggingina til meira varandi orku.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær, at tað umsitingarliga verður lættari hjá Akstovuni at umsita økið, og tað verður skjótari hjá Akstovuni at avgreiða málini, tí farið verður yvir til at nýta eitt nýtt útrokningargrundarlag fyri innfluttar brúktar persónbilar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið fer at gera tað lættari hjá teimum, sum liva av at selja brúktar bilar. Orsøkin til hetta er, at fortreytirnar verða betur kendar hjá teimum. Tað hevur við sær, at tað verður lættari at finna fram til rætta prísin til kundan frammanundan.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið við tað, at avgjaldsundantøkan fyri akfør sum bert nýta ravmagn ella vetni sum framdrift verður longt fram til 1. januar 2023, og at virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni verður lækkað. Hetta fer vónandi at skunda enn meira undir umleggingina til varandi orku.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Ongir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur jaliga ávirkan á markaforðingar, hvat flytigóðsbilum viðvíkur.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ásetingar um avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum áður eru nevndar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1, § 3, stk. 1
Skotið verður upp at broyta orðingina "persónvognar" til "persónbilar", sum er meira tíðarhóskandi. Innihaldsliga hevur broytingin ongan týdning.

Til nr. 2, § 3, stk. 2 og 3
Skotið verður upp at seta inn eitt nýtt stk. 2 í greinina. Persónbilar við hybrid tøkni ella plugin-hybrid tøkni skulu frameftir rinda minni í virðisavgjaldi. Frá 1. januar 2021 skulu hesir persónbilar rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.

Persónbilar við hybrid tøkni ella við plugin-hybrid tøkni koyra alsamt longri upp á ravmagn, og tí skulu hesi akfør ikki rinda eins nógv í virðisavgjaldi, sum akfør, ið bert nýta bensin ella dieselolju.

Somuleiðis verður skotið upp at seta eitt nýtt stk. 3 inn í greinina. Frá 1. januar 2023 skulu persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni sum framdrift rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.

Orðingin "persónbilar" í ásetingini um el- og vetnisbilar hevur við sær, at vøruvognar og motorsúkklur ikki eru fevnd av ásetingini. Hesir bólkar rinda framman undan bara ávikavist 20% og 35% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum, sbrt. §§ 4 og 5 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum.

Dømið niðanfyri vísir tríggjar nærum eins persónbilar. Tann fyrsti er ein persónbilur við bensinmotori, tann næsti er ein persónbilur við hybrid tøkni, og tann seinasti er ein persónbilur við plugin-hybrid tøkni.

Galdandi Rinda **50%** í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og **75%** verður rindað í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.					**Uppskot** Rinda **30%** í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og **45%** verður rindað í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.		
	Motorstødd kW	Ár	CIF prísur	Galdandi virðisavgjald	Uppskot virðisavgjald	Munur á galdandi og uppskotnum virðisavgjaldi	CIF prísur + uppskotið virðisavgjald
Vanligur bilur/bensin	129	2019	155.710 kr.	91.783 kr.	91.783 kr.	0 kr.	247.493 kr.
Hybrid/bensin	131	2019	203.437 kr.	127.578 kr.	76.547 kr.	-51.031 kr.	279.984 kr.
Plugin-hybrid	136	2020	289.400 kr.	192.050 kr.	115.230 kr.	-76.820 kr.	404.630 kr.

Til nr. 3, § 5
Fyri nýggjar motorsúkklur, við motorstødd yvir 50 cm^3, sum verða skrásettar fyrstu ferð, er virðisavgjaldið 35 % av avgjaldsskylduga virðinum, sum er CIF virðið á motorsúkkluni við allari tí útgerð, motorsúkklan hevur, tá hon stendur í føroyskari havn.

Skotið verður upp í stk. 2, at innfluttar, brúktar motorsúkklur, sum hava verið endaliga skrásettar uttanlands, frameftir verða avgjaldsroknaðar á sama hátt sum innfluttir, brúktir bilar, sbrt. § 6. Hetta merkir, at 35 % skal gjaldast í virðisavgjaldi av keypsprísinum frá útlendskum seljara, íroknað flutningsútreiðslur, trygging og kostnað, sum er CIF virðið, sum er grundarlagið undir útrokningini av virðisgjaldinum.

Til nr. 4, § 6
Skotið verður upp, at virðisavgjaldið fyri innflutt brúkt motorakfør, ið hava verið endaliga skrásett uttanlands, verður goldið av avgjaldsskylduga virðinum. Avgjaldsskylduga virðið á einum innfluttum brúktum motorakfari, sbrt. § 2, stk. 2 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, er tollskylduga virðið við innflutningi til landið, CIF virðið, við allari tí útgerð, akfarið hevur, tá tað stendur í føroyskari havn. Hetta merkir, at tað er keypsprísurin frá útlendskum seljara, íroknað flutningsútreiðslur, trygging og kostnað, sum er grundarlagið undir útrokningini av virðisgjaldinum.

Virðisavgjaldið verður ásett við støði í § 3 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, har 50 % verður rindað av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000,- og 75 % verður rindað í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri kr. 100.000,-

Til nr. 5, § 7, stk. 1, nr. 1
Skotið verður upp at broyta ásetta mánaðartalið frá 30 til 20 mánaðir. Hetta merkir, at verður ein hýru- ella skúlavognur skrásettur til privata nýtslu áðrenn 20 mánaðir eru gingnir frá skrásetingini sum hýru- ella skúlavognur, verður virðisavgjaldið goldið sbrt. §§ 3-5 lutfalsliga samsvarandi tíðini, sum restar í teimum 20 mánaðunum.

Til nr. 6, § 7, stk. 1, nr. 8
Skotið verður upp, at akfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni sum framdrift, frá 1. januar 2021 ikki skulu rinda virðisavgjald, um akførini eru skrásett í seinasta lagi 31. desember í 2022. Hetta er framhald av galdandi undantøku frá virðisavgjaldi.

Til nr. 7, § 7, stk. 1, nr. 9
Skotið verður upp, at flytigóðsbilar verða undantiknir virðisavgjaldi. Í verandi støðu eru flytigóðsbilar undantiknir tolli og meirvirðisgjaldi, men skulu sambært løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum rinda bæði virðisavgjald og CO^2 avgjald.

Fólk, sum flyta til landið og hava ein gamlan bil við sum flytigóðs, skulu sbrt. galdandi reglum í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum gjalda eitt lutfalsliga høgt virðisavgjald av einum gomlum bili, tí virðisavgjaldið verður roknað av upprunavirðinum, sum ongantíð verður niðurskrivað við meira enn 50%. Samstundis fáa tey upplýst frá TAKS, at tey onki skulu rinda í tolli ella meirvirðisgjaldi, tí bilurin kemur inn sum flytigóðs. Tað er óheppið, at ymiskar reglur eru galdandi á avgjaldsøkinum fyri flytigóðsbilar.

Landsstýrismaðurin hevur í stk. 2 heimild til at áseta nærri reglur fyri motorakfør í stk. 1. Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann áseta nærri reglur um flytigóðsbilar. Frammanundan er ein kunngerð um flytigóðs við heimild í toll lógini, og

hugsandi er, at ásetingarnar í nýggju kunngerðini, við heimild í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, fara at líkjast ásetingunum í kunngerðini um flytigóðs við heimild í tolllógini.
Hetta merkir m.a., at brúkt motorakfør kunnu flytast inn uttan at rinda virðisavgjald og CO^2 avgjald treytað av:

- at motorakfarið hevur verið ogn hjá tí, sum flytur, og at akfarið hevur verið endaliga skrásett í navni hansara í minsta lagi 6 mánaðir í tí landi, flutt verður úr, áðrenn innflutningsdagin, og at eigarin hevur havt fastan bústað har í minsta lagi 1 ár.
- at við endaliga skráseting er at skilja, at øll skrásetingargjøld eru goldin í tí landinum, flutt verður úr.
- at hvør persónur, sum hevur fylt 18 ár, kann bert til egna nýtslu flyta inn eitt motorakfar sum flytigóðs.
- at um motorakfar, sum er flutt inn sum flytigóðs, skiftir eigara innan 1 ár frá skrásetingardegnum, kemur motorakfarið undir avgjaldsskyldu sbrt. løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum.
- at avgjaldsskylduga virðið er keypsprísurin í útlandinum. Hevur motorakfarið verið endaliga skrásett í útlandinum í minni enn 5 ár verður avgjaldsskylduga virðið niðurskrivað við 10% fyri hvørt ár av keypsprísinum. Hevur motorakfarið verið skrásett í útlandinum í 5 ár ella meira verður avgjaldsskylduga virðið niðurskrivað til 50% av keypsprísinum.

Til nr. 8, § 9, nr. 5
Vísandi til broytingina í nr. 7, § 7, stk. 1, nr. 9 eru flytigóðsbilar sbrt. uppskotinum avgjaldsfríir, og tí verður skotið upp, at flytigóðsbilar eisini verða undantiknir CO^2 avgjaldi.

Til nr. 9, § 22, stk. 2-5
Skotið verður upp, at stk. 2-5 verður strikað. Hetta er ein fylgja av, at ásetingin um upprunavirðið verður strikað úr lógini.

Til § 2

Talan er um áseting um gildiskomu. Ásetingin hevur við sær, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2021.

Fíggjarmálaráðið, 08. desember 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Uppgerð yvir skrásetingargjald fyri tilvildarliga útvaldar bilar, innfluttir í 2017